# Til Føroya at skapa samstarv

**Í døgunum millum 5. og 7. apríl verður stór vinnuráðstevna í Føroyum. Íslendski forsætismálaráðharrin Halldór Ásgrímsson kemur á vitjan, og við honum kemur ein sendinevnd av íslendskum umboðum fyri vinnuna. Saman fara tey og føroyingar at gera sítt til, at fáa enn meiri samstarv í lag landanna millum. Tað er Íslendska Útflutningsráðið saman við føroysku Menningarstovuni sum skipað fyri tiltakinum**

*Rókur Jákupsson Jakobsen rokur@sosialurin.fo)*

## Islandic Business Delegation

Um fáar dagar verður ein vinnuráðsetvna í Føroyum. Islandic Business Delegation kemur hendan vegin at fremja samstarvið landanna millum, og í hesum sambandi gjørdi Sosialurin eitt prát við Vilhjálm Guðmundsson, sum er marknaðar leiðari í Íslendska Útflutningsráðnum. Eitt prát sum snúði seg um fyrireikingarnar til føroyaferðina og annað.

Villhjálmur sigur at byrja við, at Íslendska Útflutningsráðið javnan fer á tílíkar handilsferðir. Fyri nøkrum árum síðan plagdu tey at gera umleið tvær ferðir um árið, men yvir tey seinastu árini er hetta talið økt heilt upp í einar 8 ferðir um árið. Umboð fyri vinnuna hava verið nógv í Eysturevropa, men eisini í meiri fjarskotnum londum, so sum Kina, USA og India. Villhjálmur greiður frá, at tá ið umboð fyri vinnuna vóru í India, møttu teir teirri føroysku sendinevndini sum var í India samstundis.

Vanliga er tað Útflutningsráðið, sum kemur við hugskotum til politikarar. Teir ger eina kanning av vinnuni, og kunna síðan tey ymisku Ráðini um teirra úrskurð. Men hesaferð var øðrvísi. Íslendski forsætisráðharrin, Halldór Ásgrímsson, skeyt upp at farast skuldi til Føroya, í kjalarvørrinum á Íslandssáttmálanum, sum gevur føroyingum og íslendingum rættindir at nýta marknaðin hjá hvørjum øðrum sum egnan heimamarknað. Útflutningsráðið metti hetta vera eitt frálíkt hugskot, og so var fari í holt við at fyrireika ferðina.

## Øktur áhugi

Hetta er ikki fyrstu ferð, at



*Forsætismálaráðharrin verður við á vinnuráðstevnuni í Føroyum í døgunum 05.-07. apríl*



*Villhjálmur Guðmundsson*

Íslendsk umboð fyri vinnuna eru í Føroyum. Tey vóru her fyri fimm árum síðani, men Villhjálmur dylur ikki fyri, at áhugin í Íslandi er nógv størri hesaferð. “Vit hava veruliga merkt ein vaksandi áhuga haðani”, sigur Villhjálmur. “Eg eri vísur í at tað er Íslandsáttmálin sum er beinleiðis orsøkin til hetta, tí at hann ger vinnuliga samstarvið millum Ísland og Føroyar rættiliga áhugavert”, greiður Villhjálmur frá.

Ætlanin er at fáa samstarv í lag við føroyskar fyritøkur. “Vit vilja fegin hava eitt tætt samstarv við tí føroysku vinnuna. Tað er longu nú onkrar fyritøkur í Íslandi, sum síggja føroyska marknaðin sum sín heimamarknað. Tískil er tað spennandi hjá tí Íslendsku vinnuni at koma til Føroya at leita eftir møguligum samstarvsfeløgum”. Villhjálmur vísur á, at Íslendski útflutningurin til Føroya er rættiliga breiður og ymiskur. “Hetta er eitt frálíkt høvið hjá vinnunum báðum at hittast og menna hvørja aðra”, sigur hann.

## Fáa fundir í lag

Villhjálmur sigur at hjá teimum fyritøkum, sum vilja luttaka í ráðstevnuni, er tað týdningarmikið, at tær royna at fáa ein ella fleiri fundir í lag við Íslendskar fyritøkur. Hetta kann lættliga gerast við at klikkja seg inn á heimasíðuna www.icetrade.is/en. Haðani er tað lætt at finna framá tilfarið um tí føroysku sendinevndina, og so kann ein fyritøka fáa fundir í lag bara við at klikkja á tær fyritøkur, sum teimum ynskir at fundast við. Villjhálmur Guðmundsen vísur á, at tey sum ikki hava fingið nakrar fundir í lag enn, áttu at skunda sær at gjørt hetta, tí at tíðarfreistin nærkast.

Vilhjálmur greiður frá, at skráin fyri vinnuráðstevnuna er spennandi og tøtt. Byrjað verður mikudagin 5. apríl við eini sonevndari “briefing”, fyri okkara íslendsku gestir. Her fara Útflutningsráðið og Menningarstovan at greiða frá sínum arbeiði.

Dagin eftir, hósdag 6. apríl verður so tað stóra slagið. Dagurin verður býttur upp í fýra partar. Lagt verður út við nøkrum workshops, sum skulu fáa dialog millum luttakandi partarnar. Hesar workshops verða settar saman á ymiskan hátt, soleiðis at øll kunnu fáa sum mest burturúr. Evnini í hesum workshop eru hesi: Fríhandil, hátøkni-ídnaður og endurnýtsla.

Aftaná hetta, verður høvið hjá fyritøkum at fundast. Tað er hetta, sum Villhjálmur leggur størstan dentin á, tí at tað er so týdningarmikið at vit fáa samstarv í lag landanna millum, sigur hann.

Kl. 17.00 verður so eitt seminar hvar ið forsætismálaráðharrin fer at røða. Vónandi sleppur forsætisráðharrin eisini at upplivað, at fyritøkur undirskrivað avtalur á hesum seminari.

Dagurin endar við einum góðum nátturðabita.

Dagin eftir fer sendinevndin at vitja ymiskar føroyskar fyritøkur. “Tað er altíð spennandi at síggja hvussu fyritøkur verða riknar. Tað plagar at vera læruríkt fyri allar partar”, greiður Villhjálmur frá.

Hann sigur at tað er ómetaliga týdningarmikið at vit royna at fáa enn meiri samstarv í lag. Tað eru longu nógvar fyritøkur sum hava førkað seg inn í marknaðin hjá grannalandinum, og soleiðis eigur tað eisini at vera. “Tílík tiltøk eru lívsneyðug fyri vinnuna í báðum londum. Vit mugu royna at samstarva og fáa sum mest burturúr. Við Íslandssáttmálanum hava fyritøkur í Íslandi og Føroyum voksið um sín heimamarknað, og við hesum eru møguleikarnir nógv fleiri hjá øllum fyritøkum”, sigur Villhjálmur Guðmundsson at enda.





miðlahúsið
í Vágsbotni

Sosialurin
TÓRSGØTA 1 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Haldið Sosialin
Tekna teg sum haldara nú
450,- um ársfjórðingin
sparið 395,- í mun til leysasølu

950,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(650,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________
Bústaður: ____________
Postnr.: ____________
Bygd/býur: ____________
Telefon nr.: ____________
Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn